From: Jógvan Ósá
To: Jóannes N. Dalsgaard
Cc: Kaysten Rasmussen; teitursamuelsen
Subject: Fw: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis
Date: fríggjadagur, 25. juli 2025 10:25:48

Hey Jóannes,
Vit hava hesar viðmerkingar.

Afturat hesum hava vit ein spurning viðvíkjandi niðastuhæddini.
Hvussu verður við ístandgerðini av niðastuhæddini?
Skal Bústaðir gjalda fyri ístandgerð, um tey, ið nýta hæddina, knappliga ynskja broytingar ella betringar?

Hvussu verða leiguviðurskiftini skipað?
Skal t.d. Landssjúkrahúsið ella ambulansutænastan rinda leigu til okkum fyri at nýta niðastuhæddina?

Vinarliga
Jógvan Ósá
Stjóri/CEO

Fra: Óla Jákup Kristoffersen <ojk@jura.fo>
Sendt: fredag, juli 25, 2025 9:50 AM
Til: Jógvan Ósá <jogvan@bustadir.fo>
Emne: Re: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis

Vælkomin at senda beinleiðis til hansara.
Sendt fra min iPhone

> Den 25.07.2025 kl. 09.38 skrev Jógvan Ósá <Jogvan@bustadir.fo>:
>
> Hey Óla Jákup,
> Takk fyri.
> Er hetta nakað eg kann senda direkta til Jóannes, ella skal tað setast upp annaleiðis.
>
> Vinarliga
> Jógvan Ósá
> Stjóri/CEO
>
> ---
>
> **Fra:** Óla Jákup Kristoffersen <ojk@jura.fo>
> **Sendt:** Thursday, July 24, 2025 8:44:58 PM
> **Til:** Jógvan Ósá <jogvan@bustadir.fo>
> **Emne:** SV: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis

Gott kvøld Jógvan.

Havi lisið lógaruppskotið og viðmerkingarnar til uppskotið, og eg havi hesar viðmerkingar.

Tá tað sbr. § 1 verður sagt, at H.Gr. hevur **ræðið** á bygninginum, skijli eg tað so, at tað stórt sæð er ein óavmarkaður ræðisrættur, sum H.gr. fær eins og ein formligur tinglýstur eigari tó frásæð at selja og framleiga.

Skilji at orsøkin til, at bygningurin ikki formliga verður avhendaður til H.gr. er, at tað er grundað á byggistigið, tí so má undirlendið fylgja við. Tað eri eg ikki samdur í. Tað er ikki óvanligt, at vinnufyritøkur byggja bygningar á lendi hjá kommunum td. á havnarløgum hjá kommunum. Undirlendið undir bygninginum verður frábýtt høvuðsognini við egnum matr.nr. men er framvegis ogn hjá kommununi. Bygningin, sum vinnufyritøkan hevur latið byggja og eigur, fær egið matr.nr. sum bygningur á leigaðum lendi, og kommunan og fyritøkan gera langan leigusáttmála, sum verður tinglýstur á leigulendið. Tvs. um vit samanbera við aktuella bygningin á Eirargarði, so kemur landið framvegis at eiga lendið undir bygninginum, meðan H.gr. eigur sjálvan bygningin, eins og ein leigu- ella brúkssáttmáli uttan gjald verður tinglýstur. Haldi at tað er meira optimalt fyri tykkum at eiga bygningin sum tinglýstur eigari.

Men hinvegin skal hetta bera til, skal sjálvandi søkjast til US um frámatrikulering, sum tekur tíð. Men eg haldi, at lógaruppskotið eigur at taka hædd fyri hesum møguleikanum, og at báðir partar í felag søkja US um nevndu frámatrikulering. Um slík umsókn verður gingin á møti, verður tað gjøgnumført, sum lógin eisini eigur at geva heimild til. Um US hinvegin sýtir umsóknini við skilagóðum grundgevingum, ja so er tað støðan, sum lógaruppskotið nú fyriliggur. Haldi bara at hesin møguleiki eigur at verða royndur.

§ 6 regulerar støðuna, um ræðið verður latið aftur til landsstýrið. So tekur landsstýrið við skyldum, ið knýta seg at bygninginum herundir møguligari skuld við **veð** í bygninginum. Hetta um at landsstýrið eisini skal yvirtaka skuld við veð í bygninginum framgongur eisini av serligu viðmerkingunum. Hetta kundi bent á, at H.gr. eisini skal kunna veðseta bygningin, hóast H.gr. ikki er tinglýst sum eigari. Um tað er ætlanin, eigur tað at framganga beinleiðis av lógartekstinum, at veðseting av bygninginum er fevnt av ræðisrættinum hjá H.gr. Annars rokni eg við, at tinglýsingin kemur at burturvísa veðseting, tí H.gr. manglar heimild. Men sbr. Kortal.fo eru allir bygningarnir har umleiðir eitt samlað matr.nr. 1000a, Tórshavn. Uttan sundurbýti matrikulert av hesum bygninginum ber ikki til bert at veðseta hendan bygningin og ikki aðrar bygningar á sama matrikli. Rokni ikki við at landið fer at góðtaka, at H.gr. fer at veðseta allar bygningarnar. Tí er hendan matrikulera støðan eisini ein góð grundgeving fyri at søkja um frámatrikulering av hesum serstaka bygningi, so hann serstakt kann veðsetast av H.gr.

Nú kenni eg ikki skattskylduna hjá H.gr. Men tá grunnurin á henda hátt fær ein bygning stórt sæð til gávus, er tað relevant at hugsa um skattskyldu av gávu. Haldi at lógaruppskotið skal taka hædd fyri tí. Td. ein áseting um, at henda dispositión sbr. lógini ikki hevur nakrar skattligar avleiðingar fyri grunnin. Somuleiðis sum tú

nevndi í telefonini í dag, at tit eiga at tryggja tykkum, at tit fáa mvg`ið aftur av tykkara íløgum sum leiguíbúðir. Sum eg nevndi, vil eg eisini mæla til, at tit venda hesum við skatti og mvg við tykkara uttanhýsis grannskoðara.

Um nakað er ógreitt, vendir tú bara aftur.

Við heilsan

Óla Jákup Kristoffersen, adv.
ojk@jura.fo

Advokatskrivstovan
Frúutrød 4
Postboks 6
FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 35 33 35
Mobil +298 21 18 17
www.jura.fo

All services and communications of Advokatskrivstovan Law Firm are subject to Advokatskrivstovan Law Firm's Terms of business and Privacy Policy available at Viðskiftatreytir/Terms of business and Privatlívspolitikkur/Privacy Policy

This communication is confidential and may contain information that is legally privileged. If received in error, kindly notify us immediately and delete the communication.

Fra: Jógvan Ósá <jogvan@bustadir.fo>
Sendt: hósdagur, 24. juli 2025 15:04
Til: Óla Jákup Kristoffersen <ojk@jura.fo>
Emne: Fw: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis

Hey Óla Jákup,
Tímur tú at lesa lógaruppskotið ígjøgnum og siga mær um nakað skal viðmerkjast.
Vit hava fingið stutta freist.

Vinarliga
Jógvan Ósá
Stjóri/CEO

Fra: Teitur samuelsen <teitursamuelsen@hotmail.com>
Sendt: Thursday, July 24, 2025 3:05:02 PM
Til: ped@lawfirm.fo <ped@lawfirm.fo>; ingibjorgb@setur.fo <ingibjorgb@setur.fo>; rakulig@gmail.com <rakulig@gmail.com>; Maud Hilduberg <maud@arpekjeldsholm.dk>
Cc: Jógvan Ósá <jogvan@bustadir.fo>
Emne: VS: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis

TTK vit hava fingið frest til í morgin kl 12 at viðmerkja. Um tit hava viðmerkingar lat meg og Jógvan frætta.

Tað eru nógvar ymiskar orsøkir til, at hetta má via løgtingið sum lóg..... ma.a. byggistig hjá restingi av LS, um bygningurin blívur frá matrikkuleraður.

Vinarliga

Teitur

Fra: Jóannes N. Dalsgaard <JoannesNd@umhvorvi.fo>
Sendt: hósdagur, 24. juli 2025 13:41
Til: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Bjarni Askham Bjarnason <bab@fmr.fo>; Atli Suni Leo <Atli@fmr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Bjørgfríð Ludvig <Bjorgfrid@hmr.fo>; Sigurð í Jákupsstovu <Sigurdj@us.fo>; us <us@us.fo>; Malene Egeberg Jacobsen <malenej@us.fo>; bustadir@bustadir.fo; Teitur Samuelsen <tesa@estunlar.fo>; Jógvan Ósá <Jogvan@bustadir.fo>
Cc: Margit Stórá <MargitS@umhvorvi.fo>; Pól E. Egholm <pole@umhvorvi.fo>; Hilmar Høgenni <HilmarH@umhvorvi.fo>
Emne: Uppskot til løgtingslóg um at lata Húsalánsgrunninum ræði yvir Eiragarði 2 - til ummælis
Prioritet: Høj

Góðan dag

Viðfest verður sent tykkum til ummælis uppskot til løgtingslóg umat geva Húsalánsgrunninum ræðisrætt til bygningin Eirargarður 2 í Tórshavn.

Løgtingslógaruppskotið skal gera tað møguligt hjá Húsalánsgrunninum at gera bygningin til lestrar- og ungdómsbústaðir at leiga út.

Ætlanin er at leggja uppskotið fram á Ólavsøku. Skotbráðið er tí ógvuliga stutt. Umhvørvismálaráðið heitir á tykkum um at senda okkum tykkara viðmerkingar **ikki seinni enn í morgin fríggjadagin 25.07.2025 kl. 12:00**.

Vinaliga sendi viðmerkingar tykkara til undirritaða joannesnd@umhvorvi.fo.

Hava tit spurningar kunnu til venda tykkum til Hilmar Høgenni deildarstjóra á tlf. 558090.

Vegna Umhvørvismálaráðið
Jóannes N. Dalsgaard

fulltrúi

Telefon: +298 358700
Fartelef.: +298 734061
joannesnd@umhvorvi.fo

<image002.png>

Umhvørvismálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn
Føroyar

Telefon: +298 358700
www.umhvorvi.fo
umhvorvi@umhvorvi.fo